## VIÐMERKINGAR

# Skattalættin og almennar pensiónir

**Ingrid S. Hendriksen**

Umboð fyri samgonguna siga at skattalættin – ið serstakliga fer til høgtlønt – hevur við sær stórar ábøtur í pensiónunum. At avtalaði skattalættin hevur við sær eina hækkan av pensiónunum er ikki rætt. Samgonguflokkarnir sambandsflokkurin, fólkaflokkurin og javnaðarflokkurin hava nevniliga ikki gjørt nakra avtalu um at hækka almennu pensiónirnar (fólkapensión og fyritíðarpensión) men hava hinvegin undirskrivað samgonguskjal, ið sigur at skatta-lættarnir fyri árini 2005, 2006, 2007 og 2008 eru tengdir at einum sindur øktum inngjaldsprosenti til samhaldsfasta eftirlønargrunnin.

Í hesum sambandi skal verða mint á, at avlamispensiónistar/fyritíðarpensiónistar sambært lóg um samhaldsfasta eftirlønargrunnin ikki hava rætt til nakað útgjald úr samhaldsfasta eftirlønargrunninum.

Samlaða talið á pensiónistum í Føroyum er í alt 8.060 – av hesum fáa 5.985 fólkapensión og *2.075 fáa avlamispensión/fyritíðarpensión.* (Kelda árbók fyri Føroyar 2003). 25,7% ella fjórði hvør pensiónistur í landinum onki fíggjarligt ískoyti til sera lágu fyritíðarpensiónina frá samhaldsfasta eftirlønargrunninum og fáa hesir pensiónistar tískil ikki gagn av samhaldsfasta eftirlønargrunninum.

Útgjaldið úr samhaldsfasta eftirlønargrunninum til fólkapensiónistar hækkar við 200 kr. um mánaðin í 2005. Tær 910 kr. um mánaðin, ið verða goldnar fólkapensiónistunum úr samhaldsfasta eftirlønargrunninum í 2005 eru eitt stórliga tiltrongt fíggjarligt ískoyti til tær alt ov lágu føroysku fólkapensiónirnar.

Fólkapensión til støk er 6.713 kr. um mánaðin í Føroyum, meðan tilsvarandi pensión í Danmark er 9.327 kr. um mánaðin. Henda pensión er sostatt heilar **2.614 kr. lægri** ella 28% lægri enn tilsvarandi pensión í Danmark.

Fólkapensión til gift er einans 5.282 um mánaðin í Føroyum, meðan tilsvarandi pensión í Danmark er 6.832 kr. um mánaðin. Henda pensión er sostatt heilar **1.500 kr. lægri** ella 22,7% lægri enn tilsvarandi pensión í Danmark.

Talið á fyritíðarpensiónistum, ið fáa lægstu fyritíðarpensión er 559 og er lægsta fyritíðarpensión til gift einans 4.874 kr. um mánaðin, meðan lægsta fyritíðarpensión til gift í Danmark er 8.021 um mánaðin – henda føroyska fyritíðarpensiónin er heilar **3.147 kr. lægri** ella 39,2% lægri enn tilsvarandi pensión í Danmark. Henda pensión er einans 28,2% sammett við eina arbeiðaraløn, kelda Arbeiðsloysistryggingin.

Lægsta fyritíðarpensión til støk er einans 6.118 kr. um mánaðin, meðan tilsvarandi pensión í Danmark er 10.516 – henda før-oyska fyritíðarpensión er heilar **4.398 kr. lægri** ella 41,8% lægri enn tilsvarandi pensión í Danmark. Henda pensión er einans 35,3% sammett við eina arbeiðaraløn.

Talið á fyritíðarpensiónistum, ið fáa miðal fyritíðarpensión er 882 og er miðal fyritíðarpensión til gift einans 7.229 kr. um mánaðin, meðan miðal fyritíðarpensión til gift í Danmark er 9.093 kr. um mánaðin – henda føroyska fyritíðarpensiónin er heilar **1.864 kr. lægri** ella 20,5% lægri enn tilsvarandi pensión í Danmark. Henda pensión er einans 41,8% sammett við eina arbeiðaraløn.

Miðal fyritíðarpensión til støk er einans 8.390 kr. um mánaðin, meðan tilsvarandi pensión í Danmark er 11.588 kr. um mánaðin – henda føroyska fyritíðarpensión er heilar **3.198 kr. lægri** ella 27,6% lægri enn tilsvarandi pensión í Danmark. Henda pensión er einans 48,5% sammett við eina arbeiðaraløn.

Talið á fyritíðarpensiónistum, ið fáa hægstu fyritíðarpensión er 634 og er hægsta fyritíðarpensión til gift einans 10.125 kr. um mánaðin, meðan tilsvarandi pensión í Danmark er 12.214 kr. um mánaðin – henda pensión er heilar **2.089 kr. lægri** um mánaðin ella 17,1% lægri enn tilsvarandi pensión í Danmark. Henda pensión er einans 58,5% sammett við eina arbeiðaraløn.

Hægsta fyritíðarpensión til støk er einans 11.538 kr. um mánaðin, meðan tilsvarandi pensión í Danmark er 14.709 kr. um mánaðin. Henda pensión er heilar **3.169 kr. lægri** um mánaðin ella 21,6% lægri enn tilsvarandi pensión í Danmørk. Henda pensión er einans 66,7% sammett við eina arbeiðaraløn. Pensiónsupphæddirnar eru fyri árið 2004.

*Keldur: Almannastovan og Socialministeriet.*

Lægsta fyritíðarpensión er so lág, er hon sømir seg ikki fyri eitt sonevnt vælferðarsamfelag sum Føroyar. **Lægsta fyritíðarpensión í Føroyum er álík eini fátækraveiting, tí hon røkkur á ongan hátt til lívsins uppihald. Ein giftur fyritíðarpensiónistur, ið fær lægstu pensión, fær einans 4.874 kr. um mánaðin at liva av og svarar hetta til 58.488 kr. um árið.**

Í hesum høpi kann verða víst á, at Evropeiska samveldið (ES) nýtir fátækramørk at lýsa liviumstøður hjá borgarunum í limalondunum. ES fátækramørk, ið ofta verða nýtt, áseta, at um so er at fólk framhaldandi/-alsamt hava minni í tøkari (disponiblari) inntøku at liva av enn ávikavist 50% ella 60% av medianlønini í avvarðandi landi, liva undir fátækramarkinum

*(kelda: Socialforskningsinstituttet.*

*Verða nevndu mørk hjá ES viðvíkjandi fátækradømi nýtt fyri borgarar í Danmark fyri árið 2002 var fátækradømi, ið svarar til ávikavist 50% og 60%, 71.000 kr. og 85.200 kr. fyri nevnda ár.*

*Kelda: Social Forskning« desember 2004.*

Um so er at fátækramarkið er tað sama í Føroyum sum í Danmark, liggur lægsta avlamispensión í Føroyum langt undir nevndu fátækramørkum hjá ES meðan fólkapensión til gifty íroknað útgjaldinum úr samhaldsfasta eftirlønargrunninum liggur beint omanfyri lægra fátækramarkið hjá ES, og miðal avlamispensión til gift liggur á umleið 60% ES-fátækramarkinum. Staðfestast má, at nevndu pensiónir – ið einans eru millum 28,2% og 41,8% av føroysku arbeiðaralønini – eru so lágar at fólk, ið einans hava slíkar pensiónir at lívbjarga sælr við, liva í støðugum fátækradømi í »væl-ferðarsamfelagnum« Føroyum.

Samgongan (Sambandsflokkurin, Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin) hava gjørt sínámillum avtalu um at lata **60 mió. kr.** í skattalætta um árið í 2005, 2006, 2007 og aftur í 2008, og verða hesir skattalættar sambært Bárði Nielsen, landsstýrismanni í Fíggjarmálum, serstakliga veittir høgtløntum føroyingum. **Í staðin fyri at lata høgtløntum føroyingum stórar skattalættar/fíggjarligar lættar, eigur samgongan at seta sær fyri at fáa lágu almennu pensiónirnar uppá eitt liviligt og sømuligt støði. Alt ov lágu føroysku avlamnispensiónirnar og fólkapensiónin eiga at verða hækkaðar, soleiðis at tær koma uppum fátækra-mørkini hjá ES soleiðs at tær røkka einum støði, ið sømir seg fyri eitt vælferðarsamfelag.**

# So náddi Sosialurin aftur avgjørda nullpunktinum

**Áki Andreasen**

Herfyri fanst Høgni Hoydal hvassliga at Sosialinum og Portalinum fyri at vera propagandamaskinur fyri javnaðarflokkin. Men eg haldi, at støðan er nógv verri enn so. Sosialurin rennir ikki bara ørindi fyri javnaðarflokkin. Hann rennur altíð ørindini hjá maktini og er láturverji hjá teimum, ið longu hava vald - um tað so er politiskt ella peningaliga. Sosialurin torir ongantíð at verja tann veikara partin, og hann torir ongantíð at finnast at og tala at valdsharrunum.

Sostatt brýtur Sosialurin ikki bara øll prinsipp hjá upprunaligu javnaðarrørsluni. Hann brýtur eisini týdningarmesta prinsippið fyri eina frælsa pressu.

### Samgongu tíðindablað

Tey bestu og feskastu dømini eru greinarnar í sambandi við verkfallið hjá maskinmeistarunum, sum hava verið varpaðar út í bæði Sosialinum og á Port-



alinum. Blaðstjórin, Jan Muller, hevur altíð verið undirbrotiligur og mikrofonhaldari fyri ta til ein og hvørja tíð sitandi maktina. Men nú hevur hann sett Hera á Rógvi burturav at gera hetta skitna arbeiðið (rokni ikki við - ja, eg vóni ikki, at maðurin er útbúgvin journalistur).

### 3 greinar sum prógva vánaliga støði á Sosialinum!!

Sosialurin hevur fyrst eina andstyggiliga grein um tann sonevnda "virkandi løgmannin", Bjarna Djurholm. Stórar myndir, har hann situr við borðendan og í greinini reint mikrofonhaldarí, har Bjarni Djurholm verður spurdur, um tað hevur verið torført og tungt at taka "so stórar avgerðir". Ja, eg meini tað. Torført og tungt hjá einum fólkafloksmanni at løggeva móti fakfeløgum? Torført og tungt hjá einum heilum landsstýri og 21 tingmonnum, sum hava alt valdið, at vinna á 41 maskinmeistarum?

Í einari undantakstøðu í landinum, har landsstýrið og Løgtingið við lóg leggja upp í eitt samráðingarúrslit hjá nøkrum fáum maskinmeistarum, velur Sosialurin gjøgnum Portalin at fáa formannin í Havnar Arbeiðsmannafelag á vøllin at stuðla landsstýrinum og løgtinginum, tá tey løggeva móti einum lítlum fakfelag. Verður Hans spurdur, hvat hann hevði sagt, um løggivið varð ímóti einum sáttmála, sum hansara felag hevði gjørt í semju við arbeiðsgevararan? Nei, als onki. Bert tann boðskapur skal út, ið gagnar landsstýrinum.

Og síðani heldur Heri á Rógvi fram við eini grein um Bárð Nielsen, landsstýrismann. Hon snýr seg um, hvussu ringa tíð landsstýrismaðurin hevur og hvussu hart tað er hjá honum at brúka samgonguna til at fáa sín vilja og hvussu hann vil verja vælferðina.

Sig mær, kann Sosialurin søkka so djúpt? Sum tað er synd og hart fyri Bjarna og Bárð, sigur Sosialurin.

### "Gjald fyri vælferðina...." ella kanska heldur "gjald fyri skattalættan"

Hvørki Bjarni Djurholm ella Bárður Nielsen eru nøkur offur í hesum spæli. Teir eru valdsharrarnir, ið als ikki hava nakað at missa, men alt at vinna - og teir hava fingið sín vilja á mest primitiva hátt. Men Sosialurin ger teir til teir stakkals menninar, ið mugu fáa hjálp og stuðul. Hví tað? Teir hava fylt rákinum. Uttan iva taka felstu føroyingar undir við teimum, tí teir hava saman við Sosialinum megnað at gjørt maskinmeistararnar til nakrar grískar kraddarar, meðan landsstýrismenninir eru stakkaladýr, sum royna at verja vælferðina - "gjald fyri vælferðina" himprast tann sperdi fíggjarmálaráðharrin ikki við at siga - hví ikki siga "gjald fyri skattalættan til tey vælløntu"....???

### Tíðindaflutningur við skeivum fortekni

Hetta er tann mest andstyggiligi skjøkjujournalistikkur, eg havi sæð. At verja vinnararnar og valdsharrarnar, meðan teir veruliga veiku partarnir, sum hava tapt slagið, verða gjørdir til ómøgulig beist, ið skapa so stórar kvalir hjá teimum fittu og vælmeinandi landsstýrismonnunum

Hvat teir gomlu javnaðarmenninir høvdu sagt, um teir sóu hetta, kann ongin ivast í.

Men tað er ein sannroynd at valdið smakkar væl - so væl at grundleggjandi støði fyri tíðindaflutning verður blaka fyri borð. Alt ber til - landsstýrismenn hóreiggja sær sum tey vilja, løgmaður tegir og Sosialurin rekur tíðindaflutning sum hevði fingið sjálvt grovastu probagandamaskinurnar at steðga upp.

### 3 greinar sum høvdu fingið "dumpikarakter"

Men eg kundi hugsað mær at biðið Sosialin um at umsett hesar tríggjar greinarnar eg her havi nevnt. Og síðani at senda greinarnar til journalistskúlar í øðrum Norðurlondum og biðja teir meta um, hvussu hesar greinar fylgja journalistiskum prinsippum. Mær vitandi verða journalistar útbúnir til at halda eyga við valdsharrunum og at hjálpa borgarunum móti valdsmisnýtslu. Altso at verja tann veikara móti tí sterkara.

Trúgvi ikki, at nakar journalistur úr Norðurlondum hevði trúð uppá, at tað var eitt sokallað tíðindablað í Norðurlondum, sum borðreiðir við so fúlari valdsharralifran. Tí má Sosialurin gera greitt, at hesar greinar altso ikki eru umsettar úr russiskum frá sovjett-tíðini ella eru komnar úr Namibia. Nei, tær eru skrivaðar í Føroyum í 2005.